# Almennur fundur um flogvøllin

TÍÐINDASKRIV
*frá Vága Sambandsfelag*

Mikukvøldið 15. oktober kl. 19:30, skipar Vága Sambandsfelag fyri almennur fundi í bygdaskúlanum í Miðvági, har formenninir fyri stóru politisku flokkarnar og flogvallastjórin fara at siga sína hugsan um útbygging av flogvøllinum í Vágum.

Nógv hevur tey seinnu árini verið tosað um at útbyggja Flogvøllin í Vágum, men higartil er einki komið burturúr.

Mikukvøldið skipar Vága Sambandsfelag fyri almennum fundi í bygdaskúlanum í Miðvági, har evnið er "Útbygging av flogvøllinum". Við á fundinum verða Lisbeth L. Petersen, fyri Sambandsflokkin, Heine O. Heinesen, fyri Tjóðveldisflokkin, Jóannes Eidesgaard, fyri Javnaðarflokkin, Anfinn Kallsberg, fyri Fólkaflokkin og Finnbogi Niclasen, flogvallarstjóri.

Fundurin sum verður í bygdaskúlanum í Miðvági, mikukvøldið kl. 19:30, er almennur.

# Spælimenninir í USA

**Hesa vikuna er føroyski fólkatónleikarabólkurin Spælimenninir í USA, har teir hava ferðast regluliga síðani 1978 og har bólkurin hevur trúgva lurtarafjøld. Bólkurin fær eisini góð ummæli fyri nýggjastu fløguna úti í heimi**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*



*Í hesum døgum spæla Spælimenninir í USA*

*Mynd: www.spaelimenninir.com*

Føroyski bólkurin Spælimenninir eru hesa vikuna á ferð í USA, har bólkurin hevur ferðast regluliga síðani 1978. Sum heild hevur bólkurin ferðast nógv og víða og konsertvirksemið hevur verið stórt.

Í USA hava Spælimenninir trúgva lurtarafjøld og á ferðini verður spælt á góðum støðum – sonevndum "prestige" støðum. Eisini eru skúlakonsertir á skránni og innsløg í útvarpi.

## Stórt virksemi

Í mars í ár tóku Spælimenninir upp fløguna Malargrót, sum hevur fingið góð ummæli úti í heimi. Vert er at vitja heimasíðuna www.spaelimenninir.com fyri at frætta nærri, hevur ein hug til tess. Fløgan er upptikin í Útvarpshøllini og er ljóðblandað í Virginia.

Í juli var Tórshavnar Jazz-, Fólka- og Bluesfestivalur á skránni hjá bólkinum og í august var Folkwoods í Eindhoven í Hollandi og eisini Tatihou Festival Maritim í Fraklandi.

W W W . S O S I A L U R I N . F O

AT VELJA PRENTSMIÐJU OG TIMBURMANN
ER NAKAÐ TAÐ SAMA

Tit vilja hava fatur á tí besta handverkaranum, honum, tit kunnu hava álit á, einum meistara, ið ikki leggur eykarokning oman á eykarokning.
Einum, sum kemur tann dagin, hann hevur lovað og verður liðugur tann dagin, hann hevur lovað.

Ljóðar hetta sum eitt brot burtur úr „Sagnum og ævintýrum"?

Á Hestprent smíða vit ikki hús, men vit gera alt grafiskt arbeiði.
Tað vil siga uppseting, prent og innbinding.

Tín prentlutur er í góðum hondum hjá okkum.
Hestprent gongur nú á tjúgunda ári, og eru vit vaksin til 20 starvsfólk.

Vilt tú vita meira, hava vitjan av sølumanni okkara, ella hava eitt tilboð sendandi,
so eru vit altíð til dystin fús

HESTPRENT
Dvørgastígur 7
Postsmoga 3118
110 Tórshavn
Tel: 314555 • Fax: 318 026
t-post: hestoy@hestprent.fo

*Framhald av síðu 15*

Bjarni Olsen nedgjort af fiskeriministeren."

Her vísir bankamaðurin seg sum ein gløggan lesara, ið leggur dent á at Erasmus Montanus hevði rætt og at Per Degn var hitt stórsta spott og ein sannur idiot. Hann brúkar Montanus við øvugtum forteknið, t.v.s. at hann hevði rætt og tað er skomm at vera sum Per Degn.

Hans Pauli Strøm, hevði í Sosialinum 30 juni 1998 eina góða grein um lesandi og um Erasmus Montanus, har hann m.a. segði:

"Tað elvdi til eitt øgiligt uppstandilsi tí Rasmus kolldømdi jú alla heimsmyndina, alla tilveruhugsanina hjá bygdafólki sínum. Men har á fjallinum vildi man ikki vita av slíkum, so tey tóku í herðatoppin á Rasmusi og góvu honum tvinnar kostir í at velja: at standa við síni orð og afturfyri verða noyddur í kongsins her alt sítt unga lív - ella at avnokta sína vitan og afturfyri fáa bæði festarmoy og eitt fittligt starv. Rasmus ivaðist ikki í at velja tann seinna og mjúka kostin. Sína lærdu vitan hevði hann lætt við at kasta av sær, tí hon var ikki annað enn ein pátikin remsa, sum ongin skilti nakað av kortini og sum ongan týdning hevði fyri tilveruna á fjallinum".

Eisini Hans Pauli Strøm hevur hugsa seg um og dugir at síggja, at Erasmus Montanus er ein fleirtýddur persónur, ið bæði hevur rætt og at vitanin hjá honum møguligani verður brúkt skeivt.

## Speisemi

Mangan hevur speisemi dupultmoralin, vantandi rættvísi og óvitan sum mál. Tá er tað best. Hans Scherfig er ein meiri modernaður speisamur høvundi, ið m.a. í "Det forsømte forår" fanst at einum alt ov myndugleikastýrdum samfelag. Speisemi uttan moral er bert ein framsýning av, hvussu láturligt onkur ella okkurt er. Soleiðis brúka fólk í Føroyum Erasmsus Montanus vanliga. Tá sær ein, at speisemi eisini inniheldur eitt tilvildarligt ovurhonds vald, speisemis glottin, (um hesin er óreinur, sannur ella rættvísur) prentar framyvir eitt negativ í hugaheimin hjá lesarinum. Eina ferð eksponerað, kann offrið fyri speisemi ikki longur trína fram uttan mistanka, ella goyma síni arr. Hetta tekstaslag hevur tað við at vinna á rættvísinum og samantvinnar ósømuligt graml, sleig við myndugleikan hjá øðrum bókmentum.

Føroyskir politikarar og skribentar skulu hugsa seg um áðrenn tey blaka skeivar tulkingar av Erasmusi Montanus í gronuna á hvørjum øðrum, tí Montanus kann sum eg havi víst her, brúkast til nærum alt frá einum hálvstuderaðum og veruleikafjarðum unglinga til ein miskendan profet.



Eyðun Elttør, landsstýrismaður:

# Statoil framvegis virkið á føroyaøkinum

**- Eins og at øll hini oljufeløgini framhaldandi sýna leitingini við Føroyar áhuga**

OLJULEITING
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*



- Vit hava longt 9 ára loyvið hjá Statoil og einum øðrum felag og leggja nú seinastu hond á at fáa tað triðja níggju ára loyvið á føroyska økinum uppá pláss, og tí er heldur einki, sum bendir á, at Statoil ella nakað av hinum feløgunum, sum hava leitiloyvi, hava í umbúnað at taka seg úr økinum. Hetta sigur Eyðun Elttør, landsstýrismaður, nú tað hevur verið róð uppundir í útlendskari pressu, at oljufeløgini, sum hava leitiloyvi við Føroyar, eru við at missa áhugan heilt. Press and Journal í Skotlandi skrivaði í farnu við við at vísa til "speculation among Faroese media" , at oljufeløg eru við at missa áhugan, sjálvt um bara nakrir fáir brunnar eru boraðir, og at eitt nú Statoil er á veg út úr føroyaøkinum, ella sum tað stendur orðað, "Statoil apparently wants to dump the Faroes". Nakað líknandi hevur eisini verið frammi í bæði danskari og norskari pressu.

Eitt nú ger útlendski oljufjølmiðilin "OKI News" nógv burtur úr og skrivar m.a., at úrslitini av leitingini hava ikki verið nøktandi fyri partaeigararnar, og fleiri av feløgunum umhugsa at taka seg úr økinum. Sagt verður m.a.:

"Results have not been satisfactory to leaseholders to date, however, and several of the companies that have been exploring the area are said to be considering withdrawing. Both BP and Amerada Hess have reportedly told Faroese Radio they will not drill in there in 2004, and Statoil is reportedly ready to withdraw. It and Hess both are bound by their licensing agreements to drill one more well each before 2006, and BP is required to drill two more wells"

Eyðun Elttør, landsstýrismaður sigur, at hetta kemur sera óvart á seg og kann hann bara fáa hetta til at vera eina mistulking og misfatan av tíðindunum um, at einki av feløgunum fer at bora í næsta ár og í fyrsta lagi í 2005. – Tað er als einki nýtt fyri okkum í Oljumálaráðnum, at feløgini, sum hava 6 ára loyvi, ikki fara at bora í næsta ár. Tað hava tey fyri langari tíð síðani givið okkum fatan av, og tað er heldur einki krav, at tey skulu bora í 2004, tí sambart loyvinum kunnu tey bíða við at bora til 2006 leggur hann aftrat.

Hann sigur annars, at tað er sera óheppið, um misvísandi tíðindi koma út í útlendska oljupressu um tilgongdina í Føroyum, nú Oljumálaráðið nettupp hevur lagt upp til eina nýggja útbjóðing og hevur skrivað til oljufeløgini um at fáa tey at vera við í eini nýggjari nominatiónsrundu fyri Føroyaøkið. – Eg vil tí gera púra greitt, at vit í Oljumálaráðnum hava als ongan varhuga av, at nakað av feløgunum er við at taka seg úr økinum. Tvørturímóti hava tey víst stóran áhuga fyri at varðveita 9 ára loyvini, og tey, sum hava brunnar eftir at bora í 6 ára loyvunum hava sagt frá, at tey vilja fyrireika seg meira, áðrenn tey bora teir írestandi fýra brunnarnar. Eitt nú við at gera fleiri seismiskar kanningar.

Rúni Hansen, stjóri í Statoil váttar orðini hjá landsstýrismanninum um, at Statoil hevur ikki ætlanir um at taka seg úr Føroyaøkinum.




# Staðfest bjartskygni fekk rentur at hækka

MARKNAÐARRÁK

Eftir frágreiðingina um støðuna á amerikanska arbeiðsmarknaðinum, ið varð kunngjørd 3. oktobur, vóru øll eygu vend kunngerðini av talinum á teimum, ið fyrstu ferð søkja um arbeiðsloysisstuðul í USA. Hetta er týdningarmikil frágreiðing, ið stórur áhugi er fyri. Kunngerðin vísti at bert 382.000 umsøknir um arbeiðsloysisstuðul vóru, og hetta er lægsta talið síðani februar í ár. Er talið undir 400.000 gevur tað eina ábending um, at arbeiðsloysið í USA fellur. Eins og frágreiðingin frá 3. oktobur, gjørdist eisini hendan kunngerðin sostatt bjørt. Bæði lánsbrævarenturnar og partabrøv kvittaðu við hækkingum orsakað av góðu tíðindunum.

Orsakað av at trupult hevur verið at veita arbeiði til allar hendur í USA, vilja tøl, sum geva ábending um arbeiðsmarknaðarstøðuna, hava stóra ávirkan á virðisbrævamarknaðirnar í næstum. Aftur hósdagin verða kunngjørd tøl fyri umsøknir av arbeiðsloysisstuðli. Mett verður, at talið verður um 385.000. Um so verður ella talið gerst lægri, vil hetta sanlíkt føra við sær hækkandi lánsbrævarentur og partabrøv.

Sum kunnugt er tíðarskeiðið við kunngerðum av roknskapum fyri 3. ársfjórðing nú byrjað. Á hesum økinum eru amerikumenn fyrstir at byrja. Higartil hava m.a. virkini PepsiCo, Yahoo!, Alcoa og General Eletric øll kunngjørt hægri inntøkur enn væntað og verður hugt eftir amerikonsku virkjunum, kann sum heild staðfestast, at hesi higartil hava kunngjørt bjørt tøl.

Hesa vikuna kunngerða millum annað virkini Apple, Intel, Philips, Motorola, Ford, IBM og Nokia roknskap. Hetta eru týdningarmikil virkir, og úrslitið og ikki minst metingarnar um framtíðina hjá hesum virkjum, kunnu ávirka bæði lánsbræva- og partabrævamarknaðirnar.

Sjálvandi er trupult at meta um hvussu úrslitið hjá hesum virkjunum verður, men útlitini hjá serliga amerikonsku virkjunum, eru ikki vorðin verri enn seinasta ársfjórðing. Tískil er grundaður møguleiki fyri góðum úrslitum, eins og tveir teir seinastu ársfjórðinginarnar. Um so verður, er møguleiki fyri, at partabrøv hækka meira.

Samanumtikið verður gongdin hesa vikuna tengd at roknskapum og tølum fyri arbeiðsloysisstuðuli. Góð útlit eru fyri at hesi gerast bjørt, men samstundis kunnu hesi virka til, at vikan gerst skiftandi.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,84% | 0,07% |
| 5 ára lánsbræv | 3,68% | 0,09% |
| 10 ára lánsbræv | 4,46% | 0,09% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 252,7 | 1,0% |
| OMX, Svøríki | 600,6 | 1,6% |
| DJ Stoxx 50, Evropa | 2.523,5 | 1,7% |
| S&P 500, USA | 1.038,1 | 0,4% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 106,59 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 163,84 | -0,3% |
| Norrøn Partabrøv | 69,73 | 0,5% |
| Altjóða Partabrøv | 72,79 | -0,7% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 636,22 | 0,3% |
| EUR | 743,06 | 0,0% |
| GBP | 1.055,52 | -0,3% |
| NOK | 90,30 | -0,5% |

*Renta og kursir kl 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*